# Fjalla-renning á Sundalags-stevnuni

**Fyri aðru ferð var fjallarenning á skránni á Sundalagsstevnuni. 15 luttakarir møttu upp og tuskaðu niðan á – og oman – frá Lippuhjalla**

RENNING
*Orð & mynd:Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Í 2003 var á fyrsta sinni skipað fyri fjallarenning niðan á Sátuna í Kollafirði. Vegna mjørka bar ikki til at renna niðan á Sátuna, so í staðin varð runnið niðan á Skælingstjørn.

Í ár var ætlanin aftur at royna túrin niðan á Sátuna, men vegna mjørka so var hetta eisini broytt í ár. Runnið varð so langt sum mjørkin loyvdi – niðan á Lippuhjalla – ið er á vegnum niðan á Sátuna.

Rennarirnir vóru úr øllum aldursbólkum, 12 mannfólk og trý konufólk. Eisini var onkur útlendingur millum rennarirnir.

24,26 minuttir tók tað hjá Jóan Karl Joensen at renna teir umleið 450 metrarnar, og knappar fýra minuttir seinni komu Fredrik Tørnroos og Brian Bernhardson.

**Luttakarar og tíðir**
Jóan Karl Joensen 24.26
Fredrik Tørnroos 28.10
Brian Bernhardson 28.39
Hentza Johansen 29.13
Kristian Tørnroos 29.41
Djóni Joensen 30.02
Hans Dánial Joensen 30.40
Harry Hansen 33.29
Regin Jóanesarson 34.17
Sølvi Ragnarsson 36.09
Bergur Holm 01.02
Dávið Steffensen 01.02
Paula Eikhólm 31.08
Marna Rubeksen 31.26
Marjun av Steinum 52.04



*Runnið varð niðan á Lippuhjalla í Kollafirði.*

## Powel endurtók heimsmet

Annar av heimsins skjótastu monnum, Asafa Powell, rann sunnudagin kapping á 100 metrum í Onglandi, og Powell var skjótur í vendingini hendan dag. Hann rann teinin í tíðini 9,77 sekund, og tað er sama tíð, sum heimsmetið er. Heimsmetið eigur Powell sjálvur, men hann má deila heitið sum heimsins skjótasti maður við Justin Gatlin úr USA, sum eisini hevur runnið 100 metrar í tíðini 9,77 sekund. Tann 28. juli eru Powell og Gatlin við í somu kapping í London.




## Mavericks góða byrjan

Í hesum døgum verður spælt um amerikanska meistaraheitið í kurvabólti. Liðini í finaluni eru Dallas Mavericks og Maimi Heat. Tveir dystir eru spældir higartil, og liðið úr Dallas hevur vunnið báðar dystirnar. Í gjár var næsti dysturin spældur í Dallas, og heimaliðið vann 99-85. Finalan verður avgjørd við, at annað liðið er best av sjey dystum. Næstu tríggir dystirnir í røðini verða spældir í Maimi, og nú skal liðið úr Florida taka seg um reiggj, skal tað hava ein møguleika at vinna meistaraheitið.

# Ongland vil drekka meira vatn

**Enska fótbóltssambandið biður nú FIFA geva spælarunum møguleika at dreka vatn undir dystunum. Sviiar vóru so illur um javnleikin ímóti Trinidad og Tobago, at teir fóru til hendurs í skiftingarrúminum**

HM BÓLKUR B
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ongland vann fyrsta dystin í sínum bólki leygardagin. Paraguay var mótstøðuliðið, og einasta málið í dystinum koma tíðiliga, tá ið David Beckham sendi eitt fríspark innfyri málið, og ein spælari hjá Paraguay beindi bóltin í egið mál.

Ongland hevði gott tak á dystinum í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki høvdu teir ávísar trupulleikar við at spæla og stýra dystinum. Eftir dystin fekk tann nógv hitin í Týsklandi skyldina fyri, at Ongland ikki fekk spælt soleiðis, sum tað kundi og vildi, og nú biður enska fótbóltssambandið FIFA geva spælarunum møguleikan at drekka vatn undir dystunum.

– Vanliga brúka vit 20 litrar av vatni til ein landsdyst, men leygardagin brúktu vit 70 litrar. Hetta sigur nakað um umstøðurnar í Týsklandi. Tí er tað umráðandi, at dómararnir geva spælarunum møguleikan at fáa sær vatn, tá ið onkur steðgur er í dystinum, sigur ein talsmaður fyri enska fótbóltssambandið.

### Sviar fóru til hendurs

Sviar spældu leygarkvøldið ímóti Trinidad & Tobago, og hóast sviar spældu ein góðan dyst og skaptu eina ørgrynnu av kjansum, megnaðu teir ikki at skora. Málmaðurin hjá Trinidad & Tobago, Shaka Hislop, var dagsins maður, og sviar, sum spældu meginpartin av seinna hálvleiki við einum manni meira, vóru sera vónbrotnir eftir dystin.

Sambært svenskum fjølmiðlum var lagið so ringt, at verjuspælarin Olof Mellberg og miðvallarspælarin Fredrick Ljungberg fóru til hendurs í skiftingarrúminum. Teir báðir profilarnir á liðnum sita ikki væl um sátt, og fyri tveimum árum síðani bardust teir undir einari venjing.

Ein talsmaður fyri svenska fótbóltssambandið váttar, at tað var ófriður í svenska skiftingarrúminum eftir dystin, men at eingin veruligur bardagi var.



*David Beckham og liðfelagarnir fáa ikki nóg nógv av vatni undir dysti, siga teir. Kanska áttu teir at drukkið vatnið, heldur enn at spæla sær* *Mynd: Scanpix*

# Týskland spældi sum børn í verjuni

**Týsku vertirnir fingu góða byrjan í HM-endaspælinum. Teir skoraðu fýra mál ímóti Costa Rica, men avdúkaðu stórar trupulleikar í verjupartinum. Póland var tikið á bóli**

HM BÓLKUR A
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Setanardysturin í HM-endaspælinum gjørdist meira undirhaldandi, enn hesir dystirnir plaga at vera. Heili seks mál vórður skotin í dystinum, sum vertstjóðin Týskland vann 4-2.

Týskararnir hava havt misjøvn úrslit undan endaspælinum, men teir fingu góða byrjan við sigrinum á Costa Rica, sum verður mett millum veikaru liðini í kappingini.

Týskarar kunnu fegnast um, at teir skaptu nógvar kjansir og skoraðu fýra mál, men teir kunnu ikki verða serliga fegnir um verjupartin, har teir avdúkaðu stórar trupulleikar.

Barnafeilirnir í verjupartinum vóru av slíkum slag, at tað er undranarvert, at teir kunnu henda á so høgum stigi. Costa Rica fekk eisini tvey mál burtur úr, tá ið týsku verjuspælararnir ikki dugdu at verja, og verjuparturin kann gerast hælsinan hjá Týsklandi í dystum ímóti sterkari tjóðum enn Costa Rica.

Hin dysturin í bólki A endaði ikki soleiðis, sum tey flestu høvdu roknað við frammanundan. Pólland spældi ímóti Ecuador, og tað var Ecuador sum vann dystin 2-0.

**KOMANDI DYSTIR**

| | | |
|---|---|---|
| Bólkur E | | |
| Dagur | Kl. | Dystur |
| 12.06 | 17.00 | USA-Kekkia |
| 12.06 | 20.00 | Italia Ghana |
| Bólkur F | | |
| 12.06 | 14.00 | Australia-Japan |
| 13.06 | 20.00 | Brasil-Kroatia |
| Bólkur G | | |
| 13.06 | 14.00 | Suður Korea-Togo |
| 13.06 | 17.00 | Frakland-Sveis |

**HM-Toppskjúttar**

| | | |
|---|---|---|
| Omar Bravo | Mexico 2 | |
| Paulo Wanchope | Costa Rica | 2 |
| Miroslav Klose | Týskland | 2 |